# ítróttur

Nr. 204 • týsdagur • 26. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Nú hevur fótbólturin lítið at siga



– Tá ið tú kemur út fyri sovornum tilburði, so verður fótbólturin settur í ógvuliga týdningarleysa støðu. Vit eru allir skelkaðir av hesum, staðfestir Todi Jónsson

**Todi Jónsson er skelkaður av sorgarleikinum sunnudagin í Parkini, sum er tann fyrsti av sínum slagi í superliguni**


FÓTBÓLTSVANLUKKA
*Jóannes Hansen*


Tað plagar at vera úti í stóru verð, at tað hoyrist um sorgarleikir og vanlukkur í sambandi við fótbólt. Sunnudagin kom hetta eitt sindur nærri føroyska veruleikanum. Fleiri føroyingar taldust millum áskoðararnar í Parkini í Keypmannahavn, tá ið FCK spældi móti Viborg.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki, tá ið støðan framvegis var málleysur javnleikur, og stutt eftir at FCK liðformaðurin, Bo Svensson, hevði sæð reyða kortið, bríkslaði dómarin púra óvæntað. Norski miðvallarin hjá FCK, Magne Hoseth, hevði gjørt dómaran varðugan við, at okkurt var spinnandi galið. Ein áskoðari var dottin niður av ovaru áskoðaraplássunum og tóktist hava tað alt annað enn gott.

Vaktarfólk komu skjótt á staðið. 24 ára gamli FCK viðhaldsmaðurin varð í skundi fluttur á Ríkissjúrkahúsið, og dómarin gjørdi av, at dysturin skuldi ikki takast uppaftur. Sunnukvøldið komu boðini um, at ungi maðurin var deyður. Danski fótbóltsheimurin er skelkaður, og á middegi í gjár gjørdi DBU av, at dysturin skal ikki takast uppaftur. Liðini fáa eitt stig í part fyri málleysa javnleikin.

Í vikuskiftinum verður tøgn í ein minutt, áðrenn farið verður undir dystirnar í superliguni.

## Fótbólturin týdningurleysur

Føroyski FCK spælarin, Todi Jónsson, hevur leingi verið skaddur. Hann var ikki í Parkini sunnudagin. Hann sat við hús og fylgdi við í sjónvarpinum, og hann er skelkaður av tilburðinum sunnudagin.

– Tá ið tú kemur út fyri sovornum tilburði, so verður fótbólturin settur í ógvuliga týdningarleysa støðu. Vit eru allir skelkaðir av hesum, staðfestir Todi Jónsson.

Todi hevur eina ferð áður verið vitni til støðu og tilburð, sum tað varð tosað og skrivað nógv um. Tað var ta ferðina, tá ið norski stjørnuspælarin hjá FCK, Ståle Solbakken, undir venjing var úti fyri hjartasteðgi. Ta ferðina eydnaðist tað at bjarga lívinum, tí Ståle beinanvegin kom undir læknahond. Tilburðurin hevði við sær, at Ståle helt uppat at spæla fótbólt.

Enn røkist einki fyri, at Todi Jónsson verður førur fyri at spæla fótbólt aftur. Hann hevur skjótt í níggju vikur verið plágaður av liðbandsskaða í knænum.

## Telvararnir halda støðinum

Halda Føroyska talvlandsliðið mátti um vikuskiftið lúta fyri Spania, men hinvegin gjørdist talan eisini um tryggan sigur á Monako.

Spaniólar høvdu eitt rættiliga sterkt lið, og millum annað hevði stórmeistarin á fyrsta borðið nærum 300 rating-stig fleiri enn Olaf Berg, sum var á fremsta føroyska borðinum. Tað eydnaðist heildur ikki Olaf at gera nakað við mótstøðumannin, men bæði á øðrum og triðja borði fingu okkara menn nakað burturúr. John Rodgaard vann sítt talv, og Eyðun Nolsøe fekk javnleik, so tað var um reppið, at samlaða úrslitið gjørdist javnleikur. Hetta eydnaðist tó ikki, tá Carl Eli Nolsøe Samuelsen tapti sítt talv á fjórða borðið.

Seinni var mótstøðuliðið so Monako, og her gekst væl betri hjá okkara monnum. Hans Kristian Simonsen á øðrum borði telvaði javnt, men allir hinir føroysku telvararnir vunnu sínar dystir. Talan var Martin Poulsen, John Rødgaard og Carl Eli Nolsøe Samuelsen, sum allir hittu telvarar, ið høvdu lægri styrkismeting.

Nú níggju av teimum 14 umførunum eru farin aftur um bak, eru Føroyar á einum 78. plássi, sum er nakað betri enn tað, sum styrkismetingin undan kappingini segði. Ukraina er á odda við 27 stigum. Russland hevur 24.5 og USA 24 stig. Bestu norðanlondini eu Noreg og Ísland, sum hava 20 stig hvør.

**-jm**



Stjørnan-Neistin 25-22 (9-9):

# Neistin misti dreymasigurin

**Fáar minuttir undan dystarloki hevði Neistin møguleikan at taka alt í Klaksvík, men við tveimum leikarum í undirtali eydnaðist Stjørnuni at skora tvær ferðir á rað**


HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


Rómurin í KÍ-høllini var øgiligur, tá dómararnir blástu seinasta bríkslið í dystinum millum Stjørnuna og Neistan. Ikki tí. Hondbóltsáskoðararnir í Klaksvík hava seinnu árini verið vanir við, at lið teirra stendur sum vinnari, tá dysturin er blástur av, men tað er sjáldan, at tað hevur staðið so nógv á, sum tað gjørdi móti Neistanum.

## Spældu møguleikan

Tær bláu úr Havn vóru nevnliga als ikki komnar til Klaksvíkar fyri at geva seg yvir á nakran hátt. Heldur royndu tær frá fyrsta bríksli at spæla sín møguleika, og fyri tað heilt nógva eydnaðist hetta eisini. Tó at tær á Stjørnuni helst høvdu ætlað, at hetta bara skuldi vera enn ein sigur í røðini, so eydnaðist teimum ongantíð at fara frá Neistanum, og var tað ikki fyri eina væl spælandi Agnes Masenaite í Stjørnumálinum, kundi Neistin væl farið til hálvleiks við eini leiðslu.

Og eftir steðgin helt Neistin fram í sama lag. Alt fyri eitt tóku tær seg frá Stjørnuni, og tó at tað eydnaðist vertunum at vinna seg aftur á javnt, so sluppu tær ikki framum. Neistin helt alla tíðina rimmar fast um møguleikan at taka stigini í dystinum, og bara sjey minuttir fyri leiklok tóktust tær hava stóra møguleikan.

Støðan var 21-21. Stjørnan hevði júst fingið tveir fingrar til tveir av sínum leikarum, og heimaáskoðararnir mundu halda ondini í spenningi, nú liðið brádliga stóð fyri at tapa sín fyrsta dyst í nærum heilt kalendaraár.

Men onkursvegna, so megnaði heimaliðið nú at reisa seg. Anna Kristina Samson megnaði einsamøll at bróta ígjøgnum verjuna hjá Neistanum, soleiðis at hon fekk skorað til 22-21, og tá tað so eisini eydnaðist Stjørnuni at skora í næsta álopinum, var alt brádliga koppað á høvdið. Gaman í eydnast Neistanum at skora til 22-23, áðrenn Stjørnan aftur var fullmannað, men tað var kortini, sum mistu tær alt á gólvið við hesum. Tær megnaðu ongantíð av álvara at trýsta heimaliðið aftur, og so kundu tær reyðu økja nakað um leiðsluna, soleiðis at talan á pappírinum gjørdist um væntaða favoritt-sigurin.

## Øktur spenningur

Fyrst og fremst, so mundi dysturin tó avdúka, at kappingin í kvinnudeildini væl kann gerast meira spennandi, enn hon av fyrstan tíð tóktist verða. Bæði tí Stjørnan prógvaði, at tær eru ikki heilt so einaráðandi, sum mong hava hildið. Aftur hesaferð var spælskiparin, Joan M. Djordjevic, heima til dystin, gav sjálvandi nakað eyka til liðið, men tað tykist greitt, at hetta verður ikki gjørt til hvønn dyst, og tí kann liðið væl koma í truplar støður. Hartil verður Annika Ljósstein helst ikki før fyri at spæla hetta kappingarárið, og tó at hópurin er bæði sterkur og breiður, so kunnu slíkir leikarar vera truplir at vera fyriuttan.

Higartil hevur tó eydnast liðnum at vinna tveir av heldur truplu dystunum. Komandi vikuskifti verður vitjað á Giljanesi hjá Søljuni, sum veruliga tykist gera um seg í ár, og so er spurningurin, hvørt tað aftur tá liggja tvey stig eftir til Stjørnuna.

Og so prógvaði Neistin við sínum avriki, at eisini tær vilja fegnar spæla við í oddinum í ár. Eitt spæl, sum tey flestu annars mundu halda fór at snúgva seg um Stjørnuna og VB aftur í ár. At tapa í Klaksvík er so eingin skomm í so máta, og spennandi verður nú at vita, hvørt tað fer at eydnast Neistanum at halda fast um góðu støðuna á stigatalvuni.

### FAKTA UM DYSTIN

**Stjørnan-Neistin 25-22 (9-9)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Alina Olaru 8(1), Katarina Stepanov 6(2), Bára S. Klakstein 5, Joan M. Djordjevic 3, Anna Kristina Samson 2, Una Olsen 1, Beinta Joensen 1
Neistin: Simona Dziugyte 9(2), Marjun Tróndarson 4, Ása Dam á Neystabø 4, Annika Thomsen 2, Kára á Dunga 2, Mia Káradóttir 1
**Brotskøst:** Stjørnan 7, Neistin 2
**Útvísingar:** Stjørnan 4, Neistin 5
**Dómarar:** Hartvig Joensen & Pole Hansen

# Taptu eisini seinasta dystin

Føroyska U-17 liðið í fótbólti tapti eisini seinasta dystin á Skotlandsferðini. Hesin dysturin var ímóti, ið eins og Føroyar hevði tapt teir báðar undanfarnu dystirnar.

Tað eydnaðist tó heldur ikki okkara dreingjum at fáa stig í hesum dystinum. Noreg vann dystin 3-1, eftir at tað í steðginum stóð á jøvnum 1-1.

Tað vóru ikki farnir meira enn einir tríggir minuttir av dystinum, tá Levi Hanssen gav føroyska liðnum eina dreymabyrjan, men hóast føroyska liðið eftir hetta sýndi gott spæl, so eydnaðist ikki at halda mótstøðuni. Noreg javnaði stutt fyri hálvleik, og so var alt aftur opið. Okkara høvdu annars havt bóltin í netinum einaferð, men tá helt dómarin, at føroyskur leikari hevði gjørt fríspark.

Eftir steðgin komu normenn alt fyri eitt upp á 2-1, og so tóktist tað, sum gekk orkan undan hjá okkara monnum. Teir megnaðu ikki í sama mun at spæla seg fram eftir vøllinum, og tá Noreg so aftur økti til 3-1, fór seinasti spenningurin úr dystinum.

Soleiðis kom føroyska liðið stigaleyst aftur av ferðini, men hóast tað, so vóru nógv positiv elementir at síggja í spælinum, og so verður uppgávan hjá venjaranum at byggja víðari upp á hesi.

**-jm**


